HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

Laborantur

til kemisku kanningarstovuna

Starvslýsing
Í sambandi við at ein av okkara laborantum er farin í annað starv, verður søkt eftir laboranti.

Starvið fevnir um kemiskar kanningar innan matvøru- og umhvørvisøkið, tvs. matvørur, drekkivatn, spillivatn, svimjihylsvatn, jørð o.m.a. Av og á er sýnistøka eisini á skránni.

Vit eru í ferð við at flyta inn í nýumvældar kanningarstovur, og vit kunnu bjóða eitt starv við møguleika fyri førleikamenning og eftirútbúgving.

Fleiri upplýsingar síggjast á www.hfs.fo.

Útbúgving og royndir:
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur.

Tað er ein fyrimunur at hava royndir innan kemiskt kanningarstovuarbeiði og at hava kunnleika til góðskustýring og EDV á brúkarastøði. Somuleiðis er tað ein fyrimunur at hava koyrikort.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Tíð og setanarviðurskifti
Starvið er fulla tíð. Setanin byrjar eftir avtalu.

Lønin verður í 4. flokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum, sí sáttmála og lønartalvu á heimasíðuni hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Umsóknin
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin hin 24. oktober 2006.

Um kemisku kanningarstovuna
Í løtuni eru 4 laborantar, ein lab. teknikari og ein akademikari í føstum starvi.

Kanningarstovan er altjóða góðkend eftir DS/EN ISO/IEC 17025 og er undir eftirliti av DANAK (Dansk akkreditering), sí www.danak.dk.

Kanningarstovan er ein vælvirkandi deild, har starvsfólki dagliga strembar eftir einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóannes Guttesen, settan deildarleiðara, tel 35 64 00 ella á www.hfs.fo.

Lýsingin sæst eisini á www.hfs.fo.

Toll- og Skattstova Føroya

Løgfrøðingar

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 135 starvsfólk.

Økisskrivstovurnar røkja raksturin.

Stýrið tekur sær av yvirordnaðari planlegging og stýring. Stýrið virkar sum ráðgevi hjá økisskrivstovunum í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, onnur avgjøld og innheinting.
Stýrið hevur Landsstýrismannatænastu, og er skrivarastova fyri Toll- og Skattaráðið. Stýrið hevur samskifti við aðalráðini og landsstýrið

Í Stýrinum starvast 25 fólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: tollskatt@tollskatt.fo

Toll- og skattstova Føroya, Stýrið, ynskir at seta 2 løgfrøðingar.

Uppgávurnar hjá løgfrøðingunum eru m.a.:
- at ráðgeva Toll- og skattstovuni kring landið í løgfrøðiligum spurningum innan skatta-, avgjalds- og innkrevjingarøkið,
- at leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum,
- at gera ummælir í kærumálum, dómsmálum, og
- at luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði.

Førleikakrøv
Tann, sum settur verður, skal hava cand. jur. útbúgving. Viðkomandi skal hava, góð samstarvsevni, vera fyrikomandi og arbeiðssamur/-som. Fyrimunur kann vera, um umsøkjararnir hava viðkomandi arbeiðsroyndir, men hetta er als ikki ein treyt. Umsøkjarar ið eru við at verða liðug við útbúgvingina eru eisini vælkomin at søkja starvið.

Vit kunnu bjóða
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis er fakliga krevjandi, har tú í stóran mun hevur møguleika fyri sjálv/-ur at leggja arbeiðið tilrættis. Møguleiki er fyri eftirútbúgving.

Setanartreytir
Lønar- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búðskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

Setanarøki
Núverandi setanarøkið er Stýrið, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

Umsóknir
Um tú ynskir at vita meira um starvið, er tú vælkomin at venda tær til Vivi Eghom ella Jákup Eyðfinn Kjærbo tlf. 352600. Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 6. november 2006 kl. 12.00.

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postrúm 2151
FO-165 Argir

http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Hóttir fuglar og doyggjandi plantusløg

Heystfagnaður 2006

Veitst tú, hvørjir vandar hótta føroysku náttúruna? Kom í heystfrítíðini og finn út av tí í framsýningunum hjá Náttúrugripasavninum og Jarðfeingi. Tak vinfólk og onkran vaksnan við tær til spennandi uppgávur og ítriv.

Heystfagnaðurin er frá mánadegnum 9.oktober til fríggjadagin 13.oktober, kl 11 til 16
Ókeypis atgongd.

Føroya Náttúrugripasavn
JARÐFEINGI

Náttúrugripasavnið og Jarðfeingi
Framsýningarhøllin á Debesartrøð
Tórshavn

Kvøldskúlin á Meginskúlanum

Lærugrein:	*Lærari:*	*Tíð:*	*Tilmelding tlf.:*
Ymiskt			
Hondaarbeiði	Maja Horn	Mikukvøld	361008
Patchwork			
Seyming	Maja Horn	Hóskvøld	361008
Fimleikur	Jacquelina Benzon	Mikukvøld	361170
Orgulspæl	Vilhelmina Larsen	eftir avtalu	361164
Tinganest úr			
Føroyskum tilfari	Súsanna & Símun av Skarði	eftir avtalu	361617
Smíð	Jógvan Nicodemussen		361691
DSC / VHF skeið	Kári Horn	eftir avtalu	231310

Fyri øll skeiðini er eitt luttøkugjald upp á 350 kr, sum verður goldið, tá byrjað verður. Tó er gjaldið fyri fimleikin 250 kr.
DSC/ VHF skeiðið førir til SRC el. ROC prógv, sum kosta ávíkavist 500 kr og 700 kr.
Bókin til skeiðið fæst á skúlanum fyri 200 kr.

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og myndugleikanna góðkenning.

Sandoyar Meginskúli

Visti tú ikki tað? Sosialurin